## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi av landsynningi og regn, Seinnapartin andøvsgul av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Pasta party

### Pasta er góður matur kvøldið fyri eitt maraton

MARATON
*Heri á Rógvi*



*Fyrireikingarbólkurin til fyrsta Tórshavn marathon vóru í Høllini á Hálsi saman við hinum luttakarunum og fingu sær ein bita við pasta. F.v. Michael Jensen, Hallur Holm, Magni Mouritsen, Òli Olsen, Henning Clemens Poulsen og Robert Vilhelmsen.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Síður er kvøldið fyri eitt maraton, at luttakararnir hittast til eina máltíð og síðstu fyrireikingarnar undan strævna degnum.

Vanliga verður borðreitt við pasta, og soleiðis var eisini undan tí fyrsta Tórshavn Marathon. Luttakararnir vórðu savnaðir í Ítróttarhøllini á Hálsi. Farið varð eisini ein túr –við bili –at hyggja at teigninum, og luttakararnir fingu eina T-shirt og nummar til renningina dagin eftir.

Pasta er tiltikin góður matur við nógvari orku og lítlum og ongum feitti. Men fríggjakvøldið var kortini ikki pasta uttan nakað afturvið. Tað var møguleiki at fáa nakrar kaloriur í kroppin. Men tað ger kanska ikki so nógv, tá ið tú næsta dag ætlar tær at renna 42,195 kilometrar.

Tvær pastarættir vóru at fáa: Tann eini meira soltin – men hin hevði meira av fløta, beykon og øðrum góðum blandað uppí.

### Marknaðarføra

Robert Vilhelmsen, sum hevur staðið á odda fyri fyrireikingunum av Tórshavna maraton, sigur seg vera sera væl nøgdan við hesa fyrstu renningina.

–Vit vildu finna feilir, og tískil hava vit ikki gjørt so nógv burturúr við at marknaðarføra í ár. Okkurt er, sum skal betrast, men sum heild eru vit sera væl nøgdir, sigur Robert Vilhelmsen.

Til Tórshavn maraton komandi ár verður nógv meira gjørt við at fáa útlendingar hendanvegin.

–Teinurin er altjóða góðkendur, og Tórshavn maraton verður nú lýst úti í heimi saman við hinum maraton renningunum kring heimin, sigur Robert Vilhelmsen.

Ein fyrimunur við Tórshavn maraton er, at tað liggur um miðjan juli, og tá eru ógvuliga fá maraton aðrastaðni.

Vónir eru fyri at fáa nógvar rennarar til Føroya komandi árini at renna maraton. Í ár vóru rennarar úr Mallorca, Íslandi og Danmark komnir til Føroya, og teir lótu allir væl at, sigur Robert.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 20 |
| London | 21 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 23 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 31 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 28 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 34 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 18 |
| New York | 28 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1003 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1008 hPa. í útsynning úr Hvarvinum fer eystureftir og dýpist.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/07 kl. 06⁰⁰– 21/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 20/07 kl. 06⁰⁰–21/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 51,0 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 22. juli | 02.14 | 14.49 | 01.14 | 13.49 | 01.29 | 14.04 | 04.14 | 16.49 | 05.14 | 17.49 | 00.29 | 13.04 | — | 12.04 | 02.29 | 15.04 | 03.29 | 16.04 | 01.59 | 14.34 | 03.14 | 15.49 |
| 23. juli | 03.08 | 15.27 | 02.08 | 14.27 | 02.23 | 14.42 | 05.08 | 17.27 | 06.08 | 18.27 | 01.23 | 13.42 | 00.23 | 12.42 | 03.23 | 15.42 | 04.23 | 16.42 | 02.53 | 15.12 | 04.08 | 16.27 |
| 24. juli | 03.47 | 16.07 | 02.47 | 15.07 | 03.02 | 15.22 | 05.47 | 18.07 | 06.47 | 19.07 | 02.02 | 14.22 | 01.02 | 13.22 | 04.02 | 16.22 | 05.02 | 17.22 | 03.32 | 15.52 | 04.47 | 17.07 |
| 25. juli | 04.28 | 16.50 | 03.28 | 15.50 | 03.43 | 16.05 | 06.28 | 18.50 | 07.28 | 19.50 | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 04.13 | 16.35 | 05.28 | 17.50 |
| 26. juli | 05.13 | 17.36 | 04.13 | 16.36 | 04.28 | 16.51 | 07.13 | 19.36 | 08.13 | 20.36 | 03.28 | 15.51 | 02.28 | 14.51 | 05.28 | 17.51 | 06.28 | 18.51 | 04.58 | 17.21 | 06.13 | 18.36 |

5 707265 100029 >